## AB og KÍ vunnu

Mikukvøldið vóru fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini hjá kvinnum spældar. Á Argjum spældu AB og B36, og her eydnaðist heimaliðnum at vinna 3-1. AB var á odda 3-0, áðrenn B36 fekk eitt týdningarmikið útivallarmál til 3-1. Í Klaksvík var tað bara heimaliðið, sum skoraði. Men sigurin hjá KÍ gjørdist ikki so stórur, sum tá liðini hittust í landskappingini. KÍ fekk tvey mál, og ta leiðsluns skal liðið verja í seinna dystinum í Gøtu. Seinnu hálvfinalurnar verða spældar 28. mai. Finalan verður í Havn 1. juli.

## Christian hevur kós móti uppflyting

Tað er møguleiki fyri, at tað verður uppaftur meiri føroyskt íslett í donsku superliguni næsta kappingarár, enn tað hevur verið í hesum kappingarárinum. Í gjárkvøld vann Lyngby 4-0 á heimavølli móti Herfølge í útsettari uppgerð í næstbestu deildini. Sigurin ber við sær, at Lyngby nú er næstfremst og harvið á uppflytingarplássi. Christian Lamhauge Holst, sum hevur verið á føroyska landsliðnum, skoraði fyrsta málið fyri Lyngby. Síðani gjørdi toppskjúttin í næstbestu deildini, 19 ára gamli Morten Nordstrand, øll hini trý málini. Hann hevur higartil skorað 21 mál. Christian Lamhauge Holst, sum var skaddur eitt langt skifti, hevur nú gjørt ellivu mál.

ÍF-GÍ 3-0 (1-0):

# ÍF fangaði lívlínuna

**Við knívinum á barkanum eydnaðist fuglfirðingum at vinna sær trý ómetaliga týðandi stig, tá B68 var á vitjan mikukvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
jakup@sosialurin.fo

Við ongum stigi fyri fyrstu sjey dystirnar stóð heilt nógv á hjá ÍF, tá teir mikukvøldið dystaðust við B68. At toftamenn undan dystinum vóru triði niðastir, gjørdi ikki trýstið minni, tí snøgt sagt, so vildi ÍF verið liðugt, um dysturin ikki kastaði trý stig av sær.

### Funnu stríðsviljan

Og tað eydnaðist eisini hjá ÍF at vinna tey trý stigini. Við einum stríðsvilja, sum sjáldan hevur verið sjónligur í ár, vóru teir liðið, sum mest av øllum vildi vinna dystin.

Og tað mundi eisini hjálpa í so máta, at vertirnir løgdu seg á odda eftir bara trimum minuttum. Hanus Eliasen, sum var sera sjónligur gjøgnum allan dystin, dróg seg leysan í høgru, og tá hann sendi innfyri, tveitti Bartal seg fram og stútaði í kassan.

Eftir hetta vóru tað kanska gestirnir, sum høvdu bóltin meira. Teir royndu fleiri ferðir at spæla seg niðaneftir, men tað var tó sjáldan, at teir hóttu ÍF-málið, har Karstin Joensen fyribils hevur játtað at geva eina hjálpandi hond. Og tá teir ta einu ferðina komu heilt nær, eydnaðist fuglfirðingunum kortini at rudda á sjálvari málstrikuni.

Og eftir steðgin punkteraðu gestirnir mest sum heilt. Innan seks minuttir stóð 3-0 á talvuni, og so var eingin vegur aftur hjá B68.

Fyrra málið stóðu Hanus Eliasen og Frank Poulsen aftanfyri, tá teir spældu seg ígjøgnum, áðrenn Frank sendi bóltin innfyri. Í fyrstu atløgu fingu toftamenn stútað útfrá, men bólturin kom ikki longur enn til Høgna Zachariassen, sum við einum fløtum skoti sendi bóltin í kassan. Og Hanus var bæði ígongdsetari og skarprættari, tá seinasti seymurin varð settur í. Hann fangaði bóltin á miðvøllinum, sendi Bartal Eliasen avstað. Og tá hesin so legði flatt útfrá, var Hanus eisini maðurin, sum smekkaði bóltin í kassan til 3-0.

ÍF-B68 3-0 (1-0)
1-0: Bartal Eliasen, 3.
2-0: Høgni Zachariassen, 48.
3-0: Hanus Eliasen, 51.

## Trúðu uppá tað

Eftir dystin fingu vit orð á Hanus Eliasen, og hann duldi ikki fyri, at fótbóltstilveran í Fuglafirði nú sær nakað væl ljósari út.

– Vit høvdu sjálvandi knívin á barkanum undan dystinum, men eg haldi, at sigurin var fult uppiborin. Skjóta málið ger sjálvandi eisini, at vit fara at trúgva upp á møguleikan, og fram til 3-0 haldi eg, at vit sita á øllum. Tá fáa teir sjálvandi bóltin meira, men sigurin var mest sum vísur tá, kortini.

– Men mest av øllum, so spældu vit sum eitt lið hesaferð. Vit runnu allir fyri hvørjum øðrum, og tað er kanska tað, sum hevur manglað hinar dysitrnar.

Og við trimum stigum hava tit nú eisini fingið samband við restina av feltinum?

– Ja. Tú sært, hvussu væl tveir sigrar munaðu hjá VB. Komandi umfarið spæla vit móti Skála, og klára vit at vinna tann dystin, eru vit møguliga farnir upp um strikuna, so tað kann ganga skjótt, um byrðurin er við, helt Hanus Eliasen.

**-mørk**

NSÍ-Skála 2-1 (1-0):

# Kreppan hevur skift bústað

**Soltnu úrslitini, sum NSÍ var plágað av fyrstu umførini, eru nú at finna á Skála, har teir tríggja tær seinastu ferðirnar hava tapt oyggjauppgerðir**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
joannes@sosialurin.fo

Venjarin skal avsigast, og spælararnir duga einki. Sovorðið prutlaði undir lokinum í Runavík, tá ið NSÍ eftir fýra tey fyrstu umførini bara hevði fingið fýra stig. Nú er vent í holini. NSÍ hevur spælt fýra ferðir afturat. Tríggjar ferðir hava teir fingið fulla úrtøku, í Gøtu fingu teir eitt stig, og eftir kommunusigurin móti Skála á heimavølli mikukvøldið eru teir stutt frá at vera orduliga við í kappingini um plássið, sum teir undan kappingarbyrjan søgdu, at teir áttu at spæla við um.

Skálamenn fóru við ongum úr Runavík. Teir taptu 2-1, og teir hava fingið tvey stig burturúr fimm teimum seinastu royndunum. Tað kundi líkst kreppu á Skála, men teir siga seg framvegis hava mót um, at tað skal bera til at venda gongdini.

– Vit trýstu fyri at fáa javnleik móti NSÍ, men tað miseydnaðist. Í 1. hálvleiki vóru teir omaná, men eftir steðgin megnaðu vit at spæla upp ímóti teimum. Næstu ferð skulu vit spæla móti ÍF á heimavølli, og tá vóna vit, at fyritreytirnar fara at verða betri, sigur Pauli Poulsen, hjálparvenjari á Skála.

Tá ið hann tosar um fyritreytirnar, so hugsar hann um manningina. Í fjør var Skála flúgvandi. Tá nýttu teir í átta teimum fyrstu umførunum tólv spælarar. Í ár er eingin endi á skaðalistanum. Mikukvøldið vóru Jónhard Frederiksberg, Alexandur Johansen og Borgar Kristiansen uttanfyri við skaða. Pætur Dam Jacobsen var bæði leikbannaður og skaddur. Stutt undan steðginum noyddust bæði Bjarni Jørgensen og Teitur R. Joensen av vøllinum, tí teir vóru skaddir!

- Vit vóna, at tað nú fer at venda. Pauli G. Hansen var vongverji í 1. hálvleiki. Eftir steðgin var hann á vanliga miðvallarplássinum, og tað vísti seg, at hann er komin fyri seg aftur. Tað hevur stóran týdning, sigur Pauli Poulsen.

### NSÍ bragdligt

NSÍ legði optimistiskt og ágangandi fyri. Ofta vóru sendingarnar langar. Tær vóru ikki altíð so neyvar, men viðhvørt eydnaðist konseptið. Annar parturin var at nýta dýpdina og stinga fram ímillum til Christian Høgna Jacobsen og Sonna L. Petersen, sum hesa ferð var annar av álopsmonnunum í 4-4-2 uppstilling.

Hin parturin var at toga spælið sundur og royna við diagonalbóltum. Tað eydnaðist viðhvørt, serliga tá ið Brynjolvur Nielsen roydni at finna Andy Olsen í hinum borðinum.

– Tað er altíð neyðugt at fokusera á næstu uppgávuna. Sjálvandi er tað lættari at venja, tá ið tað gongur, sum tað hevur gjørt tær seinastu ferðirnar heldur enn, tá ið tað gongur, sum tað gekk fyrstu umførini. Eg visti, at vit áttu at megna meiri. Nú hava vit funnið fasta uppstilling, og tað er kapping um plássini. Hesa ferð vóru Dánial Hansen og Óli Hansena burturstaddir, men tað gekk kortini væl, staðfestir væl nøgdi Trygvi Mortensen, sum í løtuni neyvan er plágaður av tosi og tutli um, at hann skal leggja kongin.

NSÍ megnaði at spæla seg til málmøguleikar, men Sonni

Sonni L. Petersen og Christian Høgni Jacobsen høvdu møguleikar í opnum spæli. Sonni setti hol á við stútara eftir horna.

Eftir steðgin legði Skála fyri sum óløgi. Debus Danielsen hevði beinanvegin gyltan møguleika at javna, men Jens Martin Knudsen bjargaði meistarliga við nærra stólpan. Fyri Skála var tað sum pøs av køldum vatni, tá ið Bogi Løkin fimm metrar uttanvert brotsteigarmarkið smekkaði returbólt í málið til 2-0. NSÍ spælararnir høvdu tó ikki fingið armarnar niður aftur, tá ið spenningur kom í aftur. Bogi Gregersen sneiddi framvið trimum og eftir innlegg var Borgar Kristiansen, sum stutt undan steðginum var noyddur at fara á vøllin, fyrstur á. Hetta var fyrsta málið yvirhøvur hjá Borgari í bestu deildini.

Skála royndi eftir eina stiginum. NSÍ helt tætt, krepputosið í Runavík er burtur, og á Skála hava teir ikki mist mótið. Eftir tap í trimum oyggjauppgerðum á rað siga seg síggja fram móti ljósari tíðum. Tá ið ÍF kemur á Skála um stóra viku skal skútan vendast!

NSÍ-Skála 2-1 (1-0)
1-0: Sonni L. Petersen 26.
2-0: Bogi Løkin 55.
2-1: Borgar Kristiansen 56.